

*Alt virksemið á flogvøllinum varð merkt av vanlukkuni í Noregi. Flaggið var í hálvari stong*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Ongin frágreiðing



*Frá tíðindafundinum á middegi, har greitt varð frá syrgiliga hendingini í Strod - vinstrumegin Marius Davidsen, fíggjarstjóri Christian Andreasen, nevndarformaður og flogskiparin Johan í Niðristovu*

*Mynd: Høgni Thomsen*

Klokkan 12.30 hevði Atlantsflog tíðindafund á Flogvøllinum í Vágum. Á fundinum luttóku Kristian Andreasen, nevndarformaður í Atlantsflog, Marius Davidsen, fíggjarstjóri og Jóhan í Niðristovuð, flogovasti.

Teir greiddu frá vanlukkuni í morgun, og svaraðu annars eftir førimuni spurningum, sum fjølmiðlarnir settu. Men tað var ógvuliga avmarkað, hvat teir fingu sagt.

Tað var tó við stórari sorg, at teir staðfestu, at eitt av teirra flogførum var farið út av breytini, at eldur kom í og at trý at teimum 16 umborð hava latið lív.

- Vit hava onga frágreiðing uppá hvat er hent, og vit kenna onga orsøk enn, greiddi Kristian Andreassen frá.

- Allir avvarandi myndugleikar hava fingið boð, somuleiðis hava tey avvarðandi at teimum umborð, greiddi nevndarformaðurin í Atlantsflog frá.

Flogfarið sum í dag fór út av er tað elsta flogfarið hjá Atlantsflog, men á tíðindafundinum staðfestu tey, at tey hevði onki at gera við nógv umrødda flapsflogfarið, sum hevði trupulleikar her fyri.

- Ongin óvanlig boð komu úr torninum áðrenn, og ongin tekin eru enn um, hví tað endaði so galið, segði Kristian Andreassen.

**-rwd**

---

## Teir skuldu við flogfarinum

Gekk sum tað skuldi hevði verksmiðjustjórin á Leirvik MC, Bjørn Arne Njøs ferðaseðil við flogfarinum.

- Eg skuldi við flogfarinum á ein fund í Molde. Nú fari eg ikki at seta meg aftur í eitt flogfar.

- Beint nú siti eg bara og hugsi um tey, sum helst eru inni í brennandi flogfarinum, sigur Bjørn Arne.

Eitt annað ferðafólk, sum eisini skuldi við sama flogfari – Sigmund Brakedal úr Bømlo – greiðir soleiðis frá:

- Flogfarið megnaði ikki at steðga. Eg gerist stúrin, tá eitt flogfar ikki megnar at steðga.

**sb.**

## Eingin peningur til flogvøllin

Flogvøllurin á Stord fekk ikki pening á norsku fíggjarlógini 2007, hvørki til nýtt flogtorn ella sløkkistøð. Stord kommuna eigur 79% av flogvøllinum, og fylkiskommunan í Hordalandi restina. Tá fíggjarlógin varð løgd fram var eingin peningur játtaður til flogvøllin, og tað var heldur ikki sagt nakað um at umsóknin uppá 28 mió. kr. ikki varð játtað.

Sagt verður, at flogvøllurin á Stord lýkur ikki dagsins krøv til eina sløkkistøð. Flogvøllurin lat upp í 1985. Breytin var tá 1080 metrar. árunum 1996-97 var breytin longd við 1460 metrum. Nýggjur terminalur varð tikin í nýtslu fyri fimm árum síðani.

Mett verður kortini at tornið er í lægra lagi til tey stóru flogførini sum nú lenda her.

## - Alt var sum tað átti

Svenskur flogskipari lendi við einum flogfari hjá Atlantsflogi 20 minuttir áðrenn vanlukkurakta flogfarið.

– Eg skilji ikki hvat gekk galið, sigur hann við norskar fjølmiðlar.

Sven Erik Strandberg sigur, at alt gekk sum vanligt tá hann lendi við sínum flogfari um átta-tíðina í morgun.

- Alt sá vanligt út og líkindini vóru góð. Har var eingin vindur og flogfarið var ikki serliga tungt.

- Vit hava jú flogið her mangar ferðir áður, men breytin sjálv er heldur stutt, sigur hann.

Hann tosaði við flogskiparin á vanlukku-flogfarinum eftir tilburðin:

- Hann og 2. stýrimaðurin komu sær út gjøgnum neyðútgongdina. Hetta er ikki serliga hugaligt hjá okkum, sigur Strandberg.

Hann vil kortini ikki upplýsa, hvat flogskiparin segði:

- Hann var ov skelkaður til at siga nakað!

**sb.**